## Claus vann aftur

Blackpool spældi leygardagin ímóti Crewe í triðbestu ensku fótbóltsdeildini. Blackpool hevði munin í dystinum og vann 2-1. Í hálvleikinum var støðan 1-0 til Blackpool, og tá ið Crewe skoraði stutt fyri leiklok, hevði Blackpool gjørt sítt annað mál í dystinum, og tá var sigurin vissur. Claus Bech Jørgensen spældi allan dystin við á liðnum hjá Blackpool, sum liggur á sætta plássi í Legaue One og framvegis hevur møguleikan at vinna sær uppflyting.

## 8 mál í einum hálvleiki

Í sponsku La Primera var sonn málveitsla um vikuskiftið, tá ið Racing Santander og Athletic Bilbao spældu. Luis Prieto syrgdi fyri, at Bilbao kundi fara til hálvleiks við einari 1-0 leiðslu. Seinni hálvleikur gjørdist til satt undirhald, har ikki færri enn 8 mál komu. Nikola Zigic skeyt trý teirra, og hann var harvið høvuðsmaðurin handan 5-4 sigurin, sum heimaliðið fekk drigið í land.

Stjørnan-VB 24-17 (11-7)

# Tryggur meistarasigur til S

**Stjøran lat ongan iva vera um, at tær ætlaðu sær meistaraheitið hjá kvinnunum. Tær vunnu nevniliga tryggan sigur í triðja og avgerandi dystinum í FM-finaluni hjá kvinnum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Stjørnan var nógv tað betra liðið í triðja og avgerandi finaludystinum, og tryggi sigurin staðfesti støðuna hjá Stjørnuni sum besta føroyska kvinnuliðið í hondbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VB vann fyrsta finaludystinum í Sunset-kappingini síðsta sunnudag, tá ið tær vunnu ein tryggan sigur á Stjørnuni í Vági. Stjørnan vildi tó ikki lata VB vinna meistaraheitið í tveimum dystum, so í einum dysti, sum var rættiliga nógv merktur av nervum, vann Stjørnan uttan at imponera næsta dystin, og so var lagt upp til ein triðja og avgerandi dyst, har føroyameistarin skuldi finnast. Hesin skuldi eisini spælast í Klaksvík.

KÍ-høllin var eisini mest sum stúgvandi full av fólki, tá ið Stjørnan tók ímóti VB í avgerandi dystinum sunnudagin, og ein legði merki til, at flestu áskoðararnir vóru merktir av nervum undan dystinum, tí sjálvt um Stjørnan hevur verið rættiliga nógv tað besta liðið í ár, so hava tær til tíðir havt trupulleikar við VB.

### Stjørnan fekk flúgvandi byrjan

Tað var tó einki, sum bendi á, at leikararnir hjá Stjørnuni vóru merktir av nervum. Teir byrjaðu nevniliga sum eitt satt ódnarveður, og sjálvt um VB megnaði at fylgja við fyrstu minuttirnar, so sást væl frá fyrsta bríksli, at Stjørnan var væl brynjað til henda dystin.

Stjørnan koyrdi á, og serliga í verjupartinum høvdu tær sera gott tak á VB. VB megnaði slett ikki at spæla seg ígjøgnum, og aloftast noyddust tær at skjóta í trýstari støðu ímóti eini væl-leikandi Agne í stjørnumálinum.

Í hinum endanum koyrdi eisini, sum tað skuldi, hjá stjørnunum úr Klaksík. Tær fingu eitt mál fyri og annað eftir, og tá eitt korter var farið, mundi onkur vágbingur helst halda, at hetta sá ikki for gott út hjá teimum. Tá hevði Stjørnan nevniliga lagt seg á odda 9-4, og einki bendi á, at VB megnaði at svara aftur.

### Støðukríggj

Men eftir hetta steðgaði fullkomiliga upp hjá báðum pørtum. Hetta hendi serliga, tí at VB fekk betur tak á verjupartinum. Nú megnaðu tær at steðga bæði Alinu og Simonu, sum høvdu spælt væl fyrsta korterið, og hetta gav Stjørnuni ávísar álopstrupulleikar. Sjálvt um Stjørnan hevði trupulleikar í álopinum, so stóð verjan seg enn væl. Tær megnaðu at halda VB frá fatinum, og í samfullar níggju minuttir kom einki mál í høllini í Klaksvík, so tá fimm minuttir vóru eftir, var støðan enn 9-4 til Stjørnuna.

VB var tó liðið, sum hevði verið nærri við. Tær tóktust hava fingið betur gongd á hesa løtuna, og millum annað brendu tær tvær ferðir fríar ímóti Agne, samstundis sum Daiva misnýtti eitt brotskast. Hetta var bara ikki hálvleikurin hjá VB.

### VB vildi spæla við

Móti endanum av hálvleikinum kom tó aftur eitt sindur av lív í álopsspælið hjá báðum pørtum, og nú var tað serliga VB, sum vildi spæla við. Maja Sølvsten var komin á vøllin fyri VB síðstu løtuna, og hon setti eitt sindur av lívi í. Hon fekk eisini tvey mál síðstu løtuna av fyrra hálvleiki, so tá liðið fóru til hálvleiks, førdi Stjørnan við fýra málum, og tað vóru eisini tær reyðu úr Klaksvík, sum høvdu sett dagsskránna henda dagin.

Einki er at ivast í, at venjarin hjá VB, Egil Steintórsson, hevur snakkað við stórum orðum í hálvleikinum. VB-liðið, sum kom út til seinna hálvleik, var nevniliga hamskift, og fyrstu løtuna settu tær rættiliga Stjørnuna uppá pláss. Tá fimm minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, var støðan 12-10 til Stjørnuna, og nú tóktist rættiligur spenningur at vera komin í.

Hetta nervaði tó ikki Stjørnuna, sum koyrdi á við sama lag, og fimm minuttir seinni høvdu tær aftur vunnið sær eina fimm mála leiðslu, so nú sá ikki so gott út hjá VB. Tær kunnu tó mest takka sær sjálvum fyri, at tær ikki tóku enn fleiri mál inn á Stjørnuna. Feilir í álopinum gjørdu, at